# Løgtingslimir vilja ikki tryggja sa

**15 av teimum løgtingslimunum, ið Sosialurin hevur tosað við, ætla sær ikki at tryggja við lóg, at samkynt ikki verða happað ella verða fyri mismuni, tá málið kemur til atkvøðugreiðslu**

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Í dag var fyrsta viðger í løgtinginum av uppskotinum hja Annitu á Fríðríksmørk og Finni Helmsdal um at seta orðini kynsliga sannføring inn í tí sokallaðu rasismuparagrafina, soleiðis at tað gerst ólógligt, at happa og gera mismun orsaka av kynsligar sannføring.

Viðgerin byrjar ov seint til at hon fæst við í dagsins blað. Men tað stendur longu greitt, at tað verður sera torført at fáa hetta mál góðkent. Av teimum tinglimunum, sum vit hava fingið fatur á, ætla 14 sær at atkvøða ímóti, 10 ætla sær at atkvøða fyri, 1 ætlar sær ikki at atkvøða fyri, og 4 hava ikki tikið støðu enn, ella vilja ikki siga sína støðu fyrr enn í Tinginum, 3 tinglimir hava vit ikki fingið fatur á.

### Eitt sirkus av prestum og ættleiðing

Í samrøðunum við tinglimirnar hevur tað staðið greitt, at hetta er eitt mál, har nógvar kenslur og nógv ræðsla er bundin at. Á neisíðuni eru nógv bangin fyri, at hetta er fyrst stig ímóti skrásettum parlagi, kirkjuvígslu av samkyndum og møguleikanum fyri at ættleiða børn. Óli Breckmann sigur t.d, at hetta er ein fýratrinsrakkett, sum endar við einum sirkusi



### Alfred Olsen, sambandsflokkurin. Alfred atkvøður ímóti

Alfred fer at atkvøða ímóti, tí hann metir, at næstan eingin happar tey samkyndu. Tí sær hann ikki orsøk til at gera tílíka løggávu. Tey samkyndu høvdu t.d. stevnu herfyri og høvdu frítt at fara allastaðni.

Harafturat byggir føroyska samfelagið á kristnu hugsjónina, um at maður og kvinna eru karmur um heimið og fyri børnini. Tílík løggáva er ikki samanberilig við hesa hugsjón, heldur Alfred.

Alfred heldur, at hetta uppskotið kann føra til, at man ger teimum samkyndu størri mein. Hann sigur, at vit eru ein kristin tjóð og taka tí hond um øll - tað er grundsjónarmiðið, tí er hetta ikki neyðugt. Hann sigur seg ikki fýlast á tey samkyndu og heldur seg ikki happa nakran.

### Anfinn Kallsberg, fólkaflokkurin. Anfinn atkvøður ímóti

Annfinn fer at atkvøða saman við flokkinum. Tey hava saman tikið tí støðuna at atkvøða ímóti uppskotinum. Anfinn heldur slíka løggávu vera ein óvana. Fólkaflokkurin er ímóti allari happing, men heldur ikki, at man skal løggeva fyri hvønn bólk í sær.

Annfinn vísir til Jørgen Niclassen, sum er formaður í tingbólkinum, fyri aðrar viðmerkingar.

### Annita á Fríðríksmørk, tjóðveldisflokkurin. Annita atkvøður fyri

Annita á Fríðríksmørk er ein av uppskotstillarunum. Hon sigur, at orsøkin til, at tey stilla uppskotið, er at viðurskiftini hjá teimum samkyndu ikki eru nóg góð, sum er. Alt ov nógv almenn signal koma, sum siga, at tað ikki er rætt at vera samkynd. Tey samkyndu hava ikki sama møguleika fyri innivist í samfelagnum sum hinkynt. Ein tjóð, sum vil teljast millum heimsins bestu, kann ikki nokta teimum samkyndu grunnleggjandi rættindi. Í noktani liggur eitt afturhildni, sum ger, at man ikki kann gerast besta tjóð í heiminum, sigur Annita.

Tolsemið ímóti øllum bólkum er týdningarmikið. Tí er eisini neyðugt at vera til reiðar at lurta eftir hinum sjónarmiðunum, sigur Annita.

### Bill Justinussen, miðflokkurin. Bill atkvøður ímóti

Bill atkvøður ímóti uppskotinum, tí hann er ímóti at lata hurðina upp fyri teimum avleiðingum sum henda løggáva hevur við sær. Tú fert ikki longur at hava loyvi at siga tína meining um henda lívsháttin, og vísir til gongdina í hinum Norðurlondunum. Hasin bólkurin fer at krevja, at aðrar løgir koma á tingborðið. Tá fer tað ikki at bera til at viðgera málini nóg væl, tí tú hevur eina ákæru hangandi yvir tær, sigur Bill.

Tað at kunna úttala seg og siga sína meining eisini við teimum orðum, sum Bíblian brúkar, er eisini ein mannarættur, ið miðflokkurin ikki vil skerja Her er talan um eina løggávu, har ein bólkur fær rættindi framum aðrar bólkar, sigur Bill.

Bill sigur, at miðflokkurin fyrst og fremst ikki víðkað rættindini hjá samkyndum, tí hvat verður tað næsta? Skrásett parlag? Ættleiðing av børnum? Vit venda okkum ímóti levnaðinum ikki ímóti teimum samkyndu, sigur hann.

### Edmund Joensen, sambandsflokkurin. Edmund hevur ikki tikið støðu enn

Tingformaðurin Edmund Joensen hevur ikki tikið støðu í hesum máli enn. Hann sigur, at hann satt at siga, ikki hevur sett seg nóg væl inn í málið enn. Tí ætlar hann at fylgja viðgerini og síðan at taka støðu. Hann minnir á, at hann er ein partur av eini samgongu og tí eisini má taka støðu út frá hesum.

### Finnur Helmsdal, tjóðveldisflokkurin. Finnur atkvøður fyri

Finnur Helmsdal er saman við Annitu á Fríðríksmørk uppskotstillari. Hann sigur, at hann heldur, at vit øll eiga at vera líka fyri lógini, óansæð hvørji vit eru. Hetta mál snýr seg um rættindi, og ikki um hvat eg haldi um homoseksuell, sigur Finnur.

Hetta uppskotið snýr seg bara um greinina um diskriminering. Men persónliga hevur Finnur einki í móti, at man fer víðari. Fyri hansara skuld mugu samkynd fegin hava somu rættindi, sum hinkynd. Sum er hava tey t.d. ikki loyvið at giftast og liva kærleikan út á hendan hátt.

Finnur er ikki bangin um, at hetta kann undirgrava kristna samfelagið. Hann sigur, at her er ein munur á fólki, sum grunnleggjandi snýr seg um, um man heldur, at Bíblian er skrivað av Gudi ella av monnum. Finnur trýr, at hon er skrivað av monnum og vísir á, at bulurin í kristindóminum er humanisman. Hin bólkurin heldur, at Bíblian er skrivað av Gudi, og hesi fólk forsaka humanismuna, tí hon ikki passar heilt inn.

### Gerhard Lognberg, javnaðarflokkurin. Gerhard atkvøður í móti

Gerhard Lognberg sigur, at hann fer øgiliga erliga og av hjarta at trýsta á neiknøttin. Tá hann skal atkvøða. Hann sigur, at um man byrjar við hesið løggávuni, so verður endin, at man fer víðari. Hann sigur somuleiðis, at um hendan lógin var galdandi, tá hann skrivaði síni lesarabrøv í summar, so hevði hann enda í Skansanum.

Hann heldur, at um man vendur málinum á høvdið, so hótti Amnesty við at skriva rapportir um hann, tá hann í sambandi við, at tey samkyndu høvdu ráðstevnu, gav sína meining til kennar. Tey søgdu, at hann hevði gjørt seg inn á tey samkyndu. Her gjørdu Amnesty seg inn á meg, sigur Gerhard.

Hann heldur ikki hetta snýr seg um mannarættindi. Vit eiga ikki at venda okkum burt frá bíbliuni, tað gera vit alt ov nógv av. Eg vil heldur hava bíbliuna sum rættisnór, sigur Gerhard.

### Heðin Zachariasen, fólkaflokkurin. Heðin atkvøður ímóti

Heðin atkvøður við fólkaflokkinum ímóti uppskotinum. Hann sigur, at motivatiónin fyrst og fremst er tann, at man ikki skal taka ein bólk og gera serlógir fyri hann. Men Heðin er eisini bangin fyri, at hetta koyrir víðari og endar við gifting av fólki av sama kyni og ættleiðing av børnum. Hann metir ikki, at hetta er ein nátúrligur lívsháttur, at kvinna livur við kvinnu og maður við manni. Hetta er ein roynd at gera tað ónatúrliga náturligt, sigur Heðin.

### Heidi Petersen, tjóðveldisflokkurin. Heidi atkvøður fyri.

Heidi sigur, at hon ongantíð hevur hildið, hetta evnið verið serliga áhugavert. Kynslívið hoyrir privatlívinum til. Hon hevur t.d. ongantíð hoyrt fólk presenteraði sum hinkynt. Hon heldur, at tað er sjálvsagt, at man skal hava rættindi at hava sín seksualitet uttan at verða happaður.

Heidi er als ikki bangin, fyri at henda løggáva skal undirgrava Føroyar sum kristið samfelag. Hon heldur at tað er syndarligt, at man verður skýrdur ikki at vera rætttrúgvandi, um man ikki vil, at fólk skulu happa ein minnilutabólk.

Hon vísir á, at við kærleiksboðnum í nýggja testamenti, skrivaðu vit nýggjan sáttmála við Guð. Hon kennir, tað sum sína skyldu at tryggja, at minnilutabólkar ikki verða happaðir. Hetta áttu øll kristin at ynskt. Hon heldur eisini, at skulu Føroyar gerast sjálvstøðugar er týdningarmikið, at politikarar vísa fólki hvat teir standa fyri og siga við tey, at her er eisini pláss fyri teimum.

### Hergeir Nielsen, tjóðveldisflokkurin. Hergeir atkvøður ikki fyri

Hergeir atkvøður ikki fyri hasum uppskotinum, og hevur annars onga viðmerking um hví.

### Rói Egholm, tjóðveldisflokkurin. Rói atkvøður fyri

Eg atkvøði sjalvandi fyri uppskotinum. Eg haldi at tað er syndarligt, at tað skal koma til hetta, at man noyðist at gera tílíka løggávu. Hetta átti at verið heilt natúrligt, at vit ikki happaðu hvør annan. Tað vísir seg, at teir býir, ið hava flest moskeðir og homoseksuel, eru tey mest kreativu støðini.

Eg síggi ikki hetta sum ein vanda fyri Føroyar sum kristna tjóð. Kristindómur er persónligur millum meg og várharra. Eg taki mær av mínum trúarlívi og tak tú tær tínum. Eg haldi, at tað at siðbundna Føroyar gongur út uppá at taka sær av hvørjum øðrum.

### Jákup Mikkelsen, fólkaflokkurin. Jákup atkvøður ímóti

Jákup atkvøður við flokkinum og heldur ikki, at tað er rætt at gera eina tílíka lóg fyri ein minnilutabólk, hann er sannførdur um at hetta bara hevur eitt siktið, og tað er at viðurkenna homoseksualitet. Hann heldur ikki at talan er um happing av samkyntum. Tað at hava eina meining um homoseksuellitet er ikki at happa fólk, tað er ikki at gera mannamunm á fólki.

### Jenis av Rana, miðflokkurin. Jenis atkvøður ímóti

Høvuðsgrundgevingin fyri at Jenis atkvøður ímóti hesum er, at Bíblian er greið viðvíkjandi homoseksualiteti, og hann ynskir at fylgja Bíbliuni. Man kann ikki siga við Jesus, at man vil liva við honum, men ikki eftir hansara leiðreglum.

Jenis heldur heldur ikki, at henda løggávan er til frama fyri tey umleið 400 fólkini, sum kenna seg drigin at fólki av sínum egna kyni. Eini 4-5% av teimum eru aktiv og militant, og man hjálpir ikki teimum nógvu við at lurta eftir teimum militantu. Eini 80-95% av teimum samkyndu ynskja at verða sett í frælsið. Í teimum londunum har man hjálpir teimum, eru tey glað, tá tey verða frelst burturúr tí.

### John Johannessen, javnaðarflokkurin, John atkvøður fyri

John sigur, at sjálvandi fer hann at atkvøða fyri. Tað er náturligt at verja minnilutar. Sum javnaðarmaður kanst tú heldur ikki góðtaka happing av minnilutum. Hann sær hetta bara sum eina dagføring av mannarættindum í føroyskari løggávu. Hetta snýr seg ikki um religión, men um happing. Eg dugi slettis ikki at síggja, hvussu tað at løggeva ímóti happing, kann vera í móti kristnari trúgv. Harafturat tími eg slettis ikki at kjakast út frá religiøsum sjónarmiðum.

### Tórbjørn Jacobsen, tjóðveldisflokkurin, Tórbjørn atkvøður fyri

Tórbjørn ætlar sær at atkvøða fyri uppskotinum, tí at tað er ein konstateraður veruleiki, at ein partur av fólkinum, hevur hug at liva saman við sínum egna kyni. Hetta hevur fingið partar av meirilutanum í samfelagnum at fremja eina ávísa happing, og hetta málið snýr seg bara um, at eingin hevur rætt til at happa ein minniluta.

Tórbjørn sær ongan vanda fyri, at vit undirgrava kristna samfelagið við at samtykkja tílíka løggávu. Vit eru øll